# Fráboðan um vinnusjúku

Skylda hjá læknum og tannlæknum at siga Arbeiðseftirlitinum frá vinnusjúkum, smb. kunngerð nr. 139, frá 2. okt. 1992.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið
FAROESE WORK ENVIRONMENT AND FIRE SAFETY AUTHORITY

undir Bryggjubakka 27 | 100 Tórshavn | Tel +298 664400 | arb@arb.fo

## A. Skaðarakti

Navn á skaðarakta ______ Føðingardagur (dd.mm.áááá) ______

Bústaður ______ Postnr. ______ Bygd/Býur ______

Teldupostur ______ Telefon ______

Starv, tá sjúkuelvandi árinið fór fram ______

Kommunulækni (navn og bústaður) ______

Er skaddi: ☐ Løntakari ☐ Vinnurekandi ☐ Undir útbúgving ☐ Hjúnafelagi ☐ Onnur familja ☐ Annað

## B. Arbeiðsgevari hjá skaðarakta, tá sjúkuelvandi árinið fór fram

Navn á virki/ arbeiðsplássi ______ Telefon ______

Bústaður ______ Postnr. ______ Bygd/Býur ______

Slag av arbeiði ______ Deild, har skaðarakti arbeiddi ______ Starvstíð hjá skaðarakta ______

Árinið farið fram á øðrum stað enn á virkisbústaðnum

Hvar ______

Bústaður ______ Postnr. ______ Bygd/Býur ______

Arbeiðir framvegis hjá sama arbeiðsgevara: ☐ Ja ☐ Nei

## C. Slag av arbeiði og arbeiðsstaðið tá sjúkuelvnadi árinið fór fram

Greið frá, hvat arbeiði talan hevur verið um, sum t.d. maskinførari, reinskering, røktararbeiði o.s.fr.

______

Tilskila so neyvt sum gjørligt, hvar á arbeiðsplássinum skaðarakti arbeiddi

______

## D. Vinnuskaði og ávirkan

Høvuðsdiagnosa - helst á latíni og við diagnosukodu smb. ICD 10

______

Greið frá teimum árinum, sum hava elvt til høvuðsdiagnosuna

______

Greið frá teimum árinum, sum hava elvt til hjádiagnosuna

______

# Fráboðan um arbeiðsóhapp

Arbeiðs- og brunaeftirlitið
FAROESE WORK ENVIRONMENT AND FIRE SAFETY AUTHORITY

undir Bryggjubakka 27 | 100 Tórshavn | Tel +298 664400 | arb@arb.fo

**E. Kunning um fráboðara**

Fráboðari er ☐ Lækni ☐ Tannlækni ☐ Arbeiðsgevari ☐ Skaðarakti ☐ Annað ________

Kanningarstaður ________ Telefon ________

Fráboðari, stempul e.a., tlf.:

Staður og dagf. ________

Avrit skal sendast til ☐ Skaðarakta ☐ Annað ________

Arbeiðs- og brunaeftirlitið
FAROESE WORK ENVIRONMENT AND FIRE SAFETY AUTHORITY

undir Bryggjubakka 27 | 100 Tórshavn | Tel +298 664400 | arb@arb.fo

Við vinnusjúku er at skilja skaði ella sjúka, sum er orsakað av ávirkan frá arbeiðinum, ella umstøðum í arbeiðinum, yvir eitt tíðarskeið.

## Hjálp at skriva fráboðanina

**A.** Starv kann vera: maskinsmiður, málari, timburmaður. Ver so neyvur, ið til ber.

**B.** Hevur skaddi arbeitt á ymiskum virkjum/deildum, verður skrivað navnið á tí virki og deild, har mesta ávirkanin er farin fram.

Slag av virki kann vera: jarnsmiðja, snikkaraverkstaður, fiskavirki, matvøruhandil.

**C.** Greið frá, hvat slag av arbeiði skaddi hevur á virkinum, t.d.: maskinførari, reinskering, røktararbeiði o.s.fr.

Greið eisini frá, hvar á virkinum arbeiðið var, t.d. í smiðjuni, í kabinuni, reinskerihøll.

**D.** Greið frá høvuðsdiagnosu í sambandi við vinnuskaðan (psykisk/somatisk) ella, um hetta ikki letur seg gera, tey týdningarmiklastu sjúkueyðkennini. Tilskila, hvør ávirkan hevur ført til høvuðsdiagnosuna. Um høvuðsdiagnosan ikki nóg greitt lýsir sjúkuna/skaðan, kann ein eykadiagnosa, sum hevur samband við høvuðsdiagnosuna, brúkast. T.d. kann ein akslaskaði vera høvuðsdiagnosan, meðan ein tennisalbogi er eykadiagnosan, har báðar diagnosur hava uppruna í eintáttaðum tyngjandi arbeiði og arbeiði við føstum rørslum. Tilskila síðan, hvør ávirkan hevur ført til eykadiagnosuna. Um skaddi hevur aðrar høvuðsdiagnosur, verða hesar førdar á nýggja fráboðan.

Um tú ikki ert lækni, er nokk at greiða frá skaðanum/sjúkuni heldur enn at nýta fremmandaorð.

## Avrit

Hesi skulu hava avrit av fráboðanini: Skaðarakti.

## Onnur kunning

Øll kunna boða frá vinnusjúkum.

Læknar og tannlæknar, sum í yrki sínum staðfesta ella fáa illgruna um, at fólk hava fingið heilsubrek av arbeiði, skulu boða Arbeiðseftirlitinum frá hesum.

Skyldan at boða frá fellur burtur, um læknin ella tannlæknin hevur tryggjað sær, at starvsfelagi hevur sagt frá tí sama.

## Hvat verður fráboðanin brúkt til

Upplýsingarnar í fráboðanini verða skrásettar soleiðis, at til ber at síggja, hvaðani vinnusjúkur koma.

Upplýsingar, sum vísa aftur til fólk ella arbeiðspláss, verða ikki almannakunngjørdar.

Hetta oyðublaðið kann ikki nýtast sum fráboðan til lógarkravdu arbeiðsskaðatryggingina.

Víst verður til tryggingarfeløgini.